# Bilar

SAMRØÐA er við Rúna Lindberg frá Dekksentrinum á Bilradio á Rás2 hósdagin kl. 16.10

Magnus Gunnarsson
maggi@sosialurin.fo



# Dekksentrið moderniserað

**DEKK Dekksentrið á Falkavegi í Havn er nú nútímansgjørt við nýggjastu og mest framkomnu tólum til 4-hjólsútmáting og balansering eins og dekkverkstaði við gjøgnumkoyring**




*Jan Van De Locht frá Würth undirvísir starvsfólkunum í nýggja Hunther sporitólinum*

Mynd: Jens Kristian Vang



*Hunther sporiútgerð við 4-hjólsútmáting*

Ein rættiliga umfatandi modernisering er farin fram á Dekksentrinum í Havn við t.d. nýggjari útgerð til hjól og dekk. Tað er Würth Føroyar, sum hevur latið amerikansku Hunther útgerðina til Dekksentrið. Talan er um mest framkomnu sporiútgerð við 4-hjólsútmáting sum finst við tilhoyrandi lyft og eini elektroniskari balanseringsmaskinu sum kann tað heila.

Fyri at lætta um arbeiðsgongdina hevur dekkverkstaðið nú gjøgumkoyring, soleiðis at bilar sum koma inn til dekkskift skulu ikki bakka út aftur men koyra fram gjøgnum eitt nýtt portur, sum er gjørt á vestaru síðu á bygninginum.

Umframt nýggju útgerðina er verkstaðurin og avgreiðslan eisini nútímansgjørd og sett í stand, soleiðis at tað er sum at koma inn í ein nýggjan bygning.

Rúni Lindberg, stjóri á Dekksentrinum, sigur, at hetta verður gjørt fyri at lætta um mannagongdirnar hjá starvsfólkunum og fyri at geva kundanum eina enn betri tænastu. Umframt alt sum hevur við hjól og dekk at gera átaka vit okkum eisini at gera umvælingar t.d skifta olju, perur, umvæla bilin samb. sýnsseðil, skifta kobling, bremsur og annað - alt til sera kappingarførar prísir.

Dekksentrið innflytir flestu dekkini beinleiðis frá framleiðara, tí kunna vit altíð bjóða kundum okkara teir bestu prísirnar. Dekksentrið umboðar dekkmerkini Michelin, Gislaved og Interstate. Um kundin vil hava onnur merki, letur hetta seg eisini gera. Vit eru heildarveitari av dekkum og felgum til alt sum koyrir, sigur Rúni Lindberg.

Keypssamtøkan í Hoyvík



FK í Hoyvík sóknast eftir

**Goymslufólki / bilførara**

at byrja 1. mai ella eftir avtalu

**Arbeiðisuppgávur**: Taka móti vørum, pakka vørur, koyra ørindi í býnum, umframt at ansa eftir, at goymslan er í reinum og ruddiligum standi.

**Arbeiðstíð**: Kl 8-17 mánadag – fríggjadag

**Løn**:
Sambært sáttmálan við Havnar Arbeiðsmannafelag

Nærri fæst at vita við at venda sær til Bent Lundsgaard, tel 314149 el. 214016

Hevur hetta tín áhuga, hoyra vit fegin frá tær við skrivligari umsókn innan hósdagin 15. apríl 2010 til

FK Hoyvík
Brekkutúni 9
FO 188 Hoyvík
att: Bent Lundsgaard

fk

Kavaraskeið Kavaratúrar Søla av kavaraútgerð Leiga av kavaraútgerð




Vinnukavaraskeið byrjar 8. mai 2010

Skeiðið gevur næmingunum førleika, at útinna vinnuligt kavara-arbeiði niður á 30 metrar við vanligari luft.
Hoyr nærri um skeiðið á tel. 218929 ella send okkum ein t-post á faroedive@faroedive.fo



Umframt at skipa fyri skeiðum, skipar Faroe Dive eisini fyri kavaratúrum. Ynskir tú at luttaka á okkara túrum, so ert tú meir enn vælkomin at senda okkum ein teldupost



**Faroe Dive** hevur, sum fyrsti føroyski kavaraskúli, fingið góðkenning frá føroysku myndugleikunum, sum førleikagevandi vinnukavaraskúli, eftir nýggju kavarakunngerðini. Vit hava arbeitt fram í móti hesari góðkenning síðan í 2006.

Mylnugøta 17
700 Klaksvík
Faroe Islands
www.faroedive.fo
faroedive@faroedive.fo
tlf. 218929 el. 224224

FAROE DIVE.fo

Sosialurin / KvR 3418 00